# Vilja leingja sáttmála við Claus

**Enska fótbóltsfelagið Bournemouth er sinnað at leingja sáttmála við hálvføroyska miðvallaran Claus Bech Jørgensen í tvey ár afturat**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Í løtuni eru samráðingar millum enska fótbóltsfelagið Bournemouth og miðvallaran Claus Bech Jørgensen, sum hevur føroyska mammu.

Claus Bech Jørgensen hevur spælt í 2. deildarfelagnum Bournemouth seinasta hálva annað árið, og hetta hevur gingið so væl, at enska felagið vil halda miðvallaranum í felagnum til 2003.

Southampton, sum spælir í bestu ensku deildini, hevur verið nevnt í sambandi við Claus Bech Jørgensen, men í løtuni er lítið at frætta um hetta. Hinvegin hava fleiri onnur ensk feløg víst áhuga fyri Claus – millum annað feløg í 1. deild.

**Tók sjálvur stigið**

24 ára Claus Bech Jørgensen tók sjálvur stig til at fáa sáttmála í Englandi. Hann spældi í danska 1. deildarfelagnum AC Horsens, tá hann skrivaði til ensk feløg fyri at sleppa at royndarvenja.

Bournemouth ynskti at taka ímóti honum, og tað endaði við, at partarnir gjørdu ein eitt ára sáttmála. Hesi sáttmálin varð longdur við einum ári afturat í fjør.

Claus Bech Jørgensen hevur fast pláss á liðnum hjá Bournemouth, og hann hevur spælt væl seinastu vikurnar. Hann telist eisini javnan millum málskjúttarnar hjá felagnum, og áskoðararnir dáma hann sera væl.

Claus Bech Jørgensen sigur seg trívast væl í Bournemouth, og hann er sinnaður at halda fram har. Men samstundis lokkar eisini ein tilveran í einum av feløgunum í hægri deildunum.

VÍF-Tjaldur 31-11 (17-8)

## VÍF fult hús í báðum

**Bæði kvinnurnar og menninir úr Vestmanna hava fult stigatal, tá farið verður í endaspælið**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Eins og væntað, so hevði VÍF ongar trupulleikar av at basa Tjaldrinum í seinasta dystinum undan endaspælinum.

Úrslitið gjørdist 31-11, og tað at Tjaldur bert fekk trý mál seinna hálvleikin staðfestir helst, at talan ongantíð varð um nakran veruliga dyst millum liðini bæði.

Við sigrinum tryggjaði VÍF sær, at tær nú hava gjørt monnunum kynstrið eftir, og fara í endaspælið við 12 stigum, sum er fult stigatal

**Dysturin í tølum**
**Málskjúttar:**

VÍF: Ioana Rapa 8(3), Sóleyð Mikkelsen 6, Nicolina Eyðbjørnsdóttir 6, Nicoleta Radu 5, Jacklin Durhuus 4(1), Fríða Marjunardóttir 2
Tjaldur: Beinta Joensen 6, Melitza Ergic 2, Mona Langgaard 2, Ann Mari Østerø 1
Brotskøst: VÍF 4, Tjaldur 2
Útvísingar: VÍF 3, Tjaldur 6
Dómarar úr Kyndli: Hanus Kúrberg og Hans Thomassen

## Annfinn í fýra ár afturat

**KÍ hevur gjørt nýggjan langtíðarsáttmála við ungdómsvenjaran Anfinn Danielsen**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Annfinn Danielsen skal vera ungdómsvenjari hjá KÍ komandi fýra árini.

Hetta er greitt, eftir at fótbóltsfelagið í Klaksvík hevur gjørt langtíðarsáttmála við Annfinn.

Annfinn Danielsen hevur seinnu árin virka sum ungdómsvenjari í Klaksvík, og hetta hevur KÍ verið so væl nøgt við, at felagð vil halda Annfinn í felagnum komandi árini.

Tað er ikki vanligt, at fótbóltsfeløg í Føroyum gera so langar sáttmálar við venjarar í felagnum, men KÍ og Annfinn eru á einum máli um at halda fram við samstarvinum.

Annfinn Danielsen hevur drúgvar royndir sum venjari. Hann hevur fyrst og fremst virka sum ungdómsvenjari – nógv ár í B36 – men hann hevur eisini verið venjari hjá teimum vaksnu.



## Máltindurin, kvinnur:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Simona Dziugyte | Stjørnan | 104 | (23) |
| Ioana Rapa | VÍF | 90 | (22) |
| Vesna Tomajek | Stjørnan | 88 | (25) |
| Regina Radó | VB | 83 | (27) |
| Annika Thomsen | Neistin | 80 | (13) |
| Sóleyð Mikkelsen | VÍF | 77 | (26) |
| Nicolina Eyðbjørnsdóttir | VÍF | 61 | |
| Gurið Mortensen | VB | 60 | (4) |
| Fríða Marjunardóttir | VÍF | 59 | (8) |
| Jórun Ludvig | Kyndil | 59 | (11) |
| Andrea Lütz | VB | 56 | |
| Anna K. Samson | Stjørnan | 53 | |
| Joan M. Joensen | Stjørnan | 50 | (5) |
| Beinta Joensen | Tjaldur | 49 | (9) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 49 | (22) |

## Máltindurin, menn:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Halgir D. Olesen | H71 | 103 | (13) |
| Bjarni Wardum | Kyndil | 87 | (17) |
| Ingi Olsen | VÍF | 86 | (20) |
| Artur Johansen | StÍF | 76 | (22) |
| Dorica Tomic | KÍF | 71 | (22) |
| Sverri Justinussen | Tjaldur | 69 | (8) |
| Jónleif Sólsker | Kyndil | 65 | (22) |
| Sámal Joensen | VÍF | 63 | (3) |
| Áki Olsen | VÍF | 59 | (4) |
| Martin Hummeland | VÍF | 58 | |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 57 | (14) |
| Jacob Jónsson | Neistin | 52 | (6) |
| Mortan Hansen | Tjaldur | 46 | (3) |
| Jens Martin Knudsen | Tjaldur | 46 | (12) |
| Marius Joensen | StÍF | 45 | (1) |

### Støðan 1. Deild kvinnur

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 12 | 11 | - | 1 | - | 0 | 365 | 192 | 173 | 23 |
| 2 | Stjørnan | 12 | 9 | - | 1 | - | 2 | 334 | 264 | 70 | 19 |
| 3 | VB | 12 | 9 | - | 0 | - | 3 | 304 | 227 | 77 | 18 |
| 4 | Neistin | 12 | 5 | - | 0 | - | 7 | 256 | 269 | -13 | 10 |
| 5 | Kyndil | 12 | 5 | - | 0 | - | 7 | 270 | 323 | -53 | 10 |
| 6 | Sóljan | 12 | 1 | - | 1 | - | 10 | 218 | 319 | -101 | 3 |
| 7 | Tjaldur | 12 | 0 | - | 1 | - | 11 | 169 | 322 | -153 | 1 |

### Støðan 1. Deild menn

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 12 | 11 | - | 1 | - | 0 | 394 | 284 | 110 | 23 |
| 2 | StÍF | 12 | 7 | - | 1 | - | 4 | 355 | 313 | 42 | 15 |
| 3 | Kyndil | 12 | 6 | - | 3 | - | 3 | 337 | 303 | 34 | 15 |
| 4 | Neistin | 12 | 6 | - | 0 | - | 6 | 287 | 303 | -16 | 12 |
| 5 | H71 | 12 | 4 | - | 0 | - | 8 | 313 | 340 | -27 | 8 |
| 6 | Tjaldur | 12 | 3 | - | 0 | - | 9 | 276 | 365 | -89 | 6 |
| 7 | KÍF | 12 | 2 | - | 1 | - | 9 | 263 | 317 | -54 | 5 |


# Teknikari

Til verkstað okkara søkja vit eftir einum teknikara at byrja skjótast til ber. Sum partur av tænastudeild okkara kemur tú fyrst og fremst at takast við tænastuveiting og umvælingar av kopimaskinum, printarum og telefaksum. Á hesum øki gongur menningin frá analogum eindum til størri digitalar loysnir, har Farodane, sum Canon umboð í Føroyum, hevur eitt breitt og framkomið útboð.

Við hesum starvi gerst tú sostatt partur av eini deild í støðugari og spennandi menning.

***Vit vænta at tú:***
- ert álítandi og fyrikomandi
- ert til reiðar at taka ímóti nýggjum avbjóðingum
- hevur viðkomandi royndir innan økið
- hevur viðkomandi útbúgving - hetta er tó ikki krav

***Vit kunnu bjóða tær:***
- eitt spennandi og avbjóðandi starv
- støðuga útbúgving á økinum
- eitt gott arbeiðsumhvørvi í eini sunnari fyritøku í menning
- 40 góðar arbeiðsfelagar

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 19. januar 2001.
Lønarviðuskifti verða avtalað í samráð við leiðsluna.

farodane 01-01

FARODANE

*Farodane er 50 ára gamalt handils- og tænastuvirkið, sum í dag er ein av fremstu heildarveitarum til skrivstovuna. Virksemið fevnir um sølu og tænastu av framkomnum KT-loysnum, kopi-, fax- og AV-tólum, skrivstovuinnbúgvi og øðrum skrivstovubúnaði.*

Brekkutún 4
Postboks 109
FO-110 Tórshavn
Tlf. 311414
Fax 317534
e-postur:
farodane@farodane.fo
www.farodane.fo






# Gøtu cup 2001

Gøtu ítróttarfelag skipar fyri innandura kapping fyri gentir og dreingir. Kappingin verður á Kambsdali 20. og 21. januar.

**Aldursbólkar:**

| | | |
|---|---|---|
| Pinkur | | (f. 91-92) |
| Gentur | 10-12 | (f. 89-90) |
| Smágentur | 12-14 | (f. 87-88) |
| Smápiltar | | (f.91-92) |
| Piltar | | (f. 89-90) |
| Smádreingir | | (f. 87-88) |



Á hvørjum liði eru 5 leikarar. Loyvt er at hava ein skiftisleikara. Heiðursmerki verða latin til trý tey bestu liðini í hvørjari deild.

Luttøkugjaldið er 200 kr. fyri liðið.

**Tilmelding:** Símin Petur Justinussen tlf. 44 18 53 ella hjá Sonju á Líðarenda tlf. 44 17 44 ella 21 17 44

***Seinasta freist at melda til er 18. januar***

**Gøtu Ítróttarfelag**



# Útsølan í Línbúðini

**Byrjar 16. jan. kl. 09.00.**

**BH frá 98,-**

**...og mangt annað**

Sosialurin - 311820

**-10%**

**Ikki útsøluvøra týsdag til leygardag**

# Línbúðin

Tróndagøta 32 • 100 Tórshavn • Tel. 31 23 85